# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Slagið um Havnina

**Hjá bæði monnum og kvinnum verður slagið um Havnina á skránni um vikuskiftið. Her møtast Kyndil og Neistin nevniliga, og serliga hjá monnum skal Kyndil bøta um keðiliga byrjanina, tá teir taptu stórt ímóti StÍF í fyrsta dystinum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hjá bæði kvinnum og monnum verður fult umfar í hondbóltinum um vikuskiftið, tá annað umfar verður á skránni. Eftir fyrstu dystirnar í einum kappingarári er sjálvandi ringt at meta um, hvussu sterk liðini eru, men eftir annað umfar byrjar man rættiliga at fáa fyrstu ábendingarnar.

Størsti spenningurin um vikuskiftið verður uttan iva í høvuðsstaðnum, har teir grøna úr Kyndli møta teimum bláu úr Neistanum hjá bæði kvinnum og monnum. Dystirnir í millum hesi bæði feløgini plaga altíð at vera spennandi, og tí verður lagt upp til tveir spennandi dystir í høllini á Hálsi leygardagin.



*Stórdystir verða í Havnini leygardagin, tá Kyndil og Neistin bresta saman hjá bæði kvinnum og monnum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Kyndil uttan Janus Einar

Um byrjað verður við monnunum, so hevur Kyndil nakað at prógva, tá teir møta Neistanum sunnudagin. Kyndil tapti nevniliga stórt í fyrsta dystinum, og tí skulu meistararnir aftur á rætta kós.

Hjá Neistanum ræður hinvegin um at halda fast um góðu gongdina. Í fyrsta dystinum vunnu teir við fýra málum á vestmenningum, og hetta spælið skulu teir royna at finna fram aftur.

Toppdysturin í Atlantic Airways-kappingini verður annars í Hoyvík, har H71 tekur ímóti StÍF. Bæði H71 og StÍF vóru sannførandi síðsta vikuskiftið, tá tey vunnu trygt ímóti ávikavist KÍF og Kyndli. Ætlanin hjá liðunum er uttan iva at halda fast um góðu gongdina, og tí kunnu fólk vænta ein spennandi dyst í Hoyvíkshøllini leygardagin.

Síðsti dysturin hetta vikuskiftið verður í Vestmanna, har VÍF tekur ímóti KÍF. Bæði VÍF og KÍF vóru nakað við síðuna av sær sjálvum síðsta vikuskiftið í fyrsta umfarinum, og tí hava bæði nakað at prógva leygardagin. VÍF hevur altíð havt rættiliga gott tak á kollfirðingum í Vestmanna, og tí verður spennandi at síggja, um hetta aftur fer at gera seg galdandi í ár.

### VB spælir fyrsta dystin

Hjá kvinnunum verður eisini lagt upp til ein spennandi dyst í Havn leygardagin, tá tey bæði havnarfeløgini bresta saman. Neistin má uttan iva metast at vera favorittur eftir stórsigurin á VÍF í fyrsta dystinum, men missurin av Ásu á Neystabø fer uttan iva at følast.

Kyndil fekk ikki eins góða byrjan og Neistin, tá grøna havnarliðið bert fekk javnleik á StÍF. Kyndil ætlar sær longur upp í ár enn í fjør, og tí er Neistin sjálvandi eitt av liðunum, sum Kyndil skal royna at vinna. Henda møguleikan fáa tær grønu leygardagin.

Seinni dysturin hjá kvinnunum verður í Vestmanna leygardagin, har VB vitjar hjá VÍF. Enn hevur VB ongan dyst spælt í Sunset-kappingini í ár, og tí kenna vit einki til styrkina hjá teimum. VB eru tó altíð drúgvar, tá á stendur, so tær eru helst favorittar til dystin í Vestmanna. Hinvegin vísti VÍF í fyrra hálvleiki ímóti Neistanum, at teir eisini kunnu spæl við ímóti hinum liðunum, so kanska VÍF fer at yvirraska ímóti VB.

## KÍ-málverji til Íslands

**Íslendsku meistararnir í Váli hava sent boð eftir KÍ-málverjanum Randi S. Wardum, sum skal royndarvenja í felagnum um vikuskiftið**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*

20-ára gamla Randi Wardum, ið byrjaði at spæla fótbólt við HB, skifti fyri fýra árum síðani HB-búnan út við KÍ-búnan. Og ikki kann sigast annað enn, at tað hevur gingið strálandi hjá henni og KÍ. Eftir 4 árum hevur hon vunnið sær heili 4 Føroyameistaraheiti, 4 luttøkur í kappingum fyri meistaralið og vunnið sær pláss á landsliðnum.

Í gjárkvøldið gjørdist eisini greitt, at íslendska felagið Valur vil hava Randi til royndarvenjing.

- Hetta tykist ganga øðiliga skjótt fyri seg. Venjarin gav mær boðini fyrradagin og eg skal longu avstað seinnapartin í dag, fortelur Randi. Hon leggur afturat, at hon væntar ikki at hon orduliga skilur, hvat tað er sum fyriferst, fyrr enn hon stendur mitt í tí.

Randi fer til Íslands í dag og kemur heim aftur mánakvøldið.

Valur er íslendskur meistari, og í summar var liðið við í UEFA Cup kappingini fyri kvinnur, sum varð spæld í Føroyum. Her munnu tær helst hava fingið eyga á KÍ-málverjan.

Válur setti seg fyrst í samband við KÍ, áðrenn tey sluppu at tosa við Randi sjálva.

-Fyri ein fótbóltsleikara vil tað altíð vera meiri spennandi at sleppa at royna seg úti í Europa, og var hetta nokk størsta orsøkin til, at eg skifti felag á sinni, greiður Randi frá.

# Fyrstu servurnar servast

**Um vikuskiftið fer flogbólturin í gongd aftur. Hjá kvinnunum verða tríggir dystir á skránni, meðan tveir verða hjá monnum**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

So er tíð aftur hjá áhugaðum at fara at hyggja eftir flogbólti. Um vikuskiftið fara fremstu flogbóltsliðini í landinum nevniliga at kappast aftur, og í fyrstu atløgu verða fimm dystir á skránni.

Hjá kvinnunum skal Fleyr fyri fyrstu ferð í nógv ár royna seg í bestu deildini, meðan spennandi dystur verður á Kambsdali millum menninar hjá ÍF og Fram mánakvøldið.

### Spennandi á Giljanesi

Mest spennandi dysturin í bestu kvinnudeildini í flogbólti verður helst á Giljanesi, har Dráttur tekur ímóti TB. Hesi bæði liðini hava verið við til at mynda oddin í bestu kvinnudeildini seinastu árini, og málið hjá teimum er helst aftur at enda frammi í oddinum.

Í Kollafirði verður eisini ein spennandi dystur á skránni, tá KÍF tekur ímóti Fleyr. KÍF hevur mist nógv fólk í mun til síðsta kappingarár, og tí skulu tær spæla fleiri nýggja leikarar inn á liðið. Hjá Fleyr er talan eisini um nýtt fólk í bestu deildini. Á aðalfundinum hjá flogbóltssambandinum fekk Fleyr nevniliga eitt pláss í bestu deildini, og nú skulu tær vísa, hvør dugur er í teimum.

Síðsti dysturin verður í Sørvági, har SÍ tekur ímóti Mjølnir. SÍ er uttan iva favorittar at vinna henda dystin, men ungu kvinnurnar hjá Mjølni eru blivnar eitt ár eldri, og tí fara úrslitini í ár helst at vera meira støðug enn í fjør.

### Fram vitjar hjá meistarunum

Størsti spenningurin í fyrsta umfari hjá monnunum í flogbólti verður á Kambsdali, har meistararnir úr ÍF taka ímóti Fram. Hesin dysturin er tó ikki fyrrenn mánakvøldið, men Fram ætlar uttan iva at vísa ÍF, at teir í ár ætla sær at spæla við heilt frammi í oddinum.

Seinni dysturin hjá monnunum verður í Sørvági, har SÍ tekur ímóti Fleyr. Hetta er tey bæði liðini, sum endaðu aftast í kappingini í fjør, og spennandi verður at síggja, hvussu sterk liðini eru í ár.

**Flogbóltur um vikuskiftið**
**Meistaradeild kvinnur:**

| | |
|---|---|
| KÍF – Fleyr | Leygardagin kl. 14.00 |
| SÍ – Mjølnir | Leygardagin kl. 14.00 |
| Dráttur – TB | Leygardagin kl. 16.00 |

**Meistaradeild menn:**

| | |
|---|---|
| SÍ – Fleyr | Leygardagin kl. 16.00 |
| ÍF – Fram | Mánadagin kl. 18.00 |

**Hondbóltur um vikuskiftið**
**Atlantic Airways-kappingin:**

| | |
|---|---|
| VÍF – KÍF | Leygardagin kl. 16.00 |
| Kyndil – Neistin | Leygardagin kl. 16.00 |
| H71 – StÍF | Leygardagin kl. 17.00 |

**Sunset-kappingin:**

| | |
|---|---|
| VÍF – VB | Leygardagin kl. 14.30 |
| Kyndil – Neistin | Leygardagin kl. 14.30 |